# Trý ferðsluóhapp í hálvan tíma



*Hóast bilarnir fóru illa, hendi einki álvarsligur mansskaði. Ein førari breyt øsbeinið, og eitt ferðafólk annan armliðin*
*Mynd: Rógvi Nybo*

**Stutt eftir klokkan 22 í gjárkvøldið gjørdist brádliga hált sum á kalvabaki við innkoyringina til Hósvíkar. Trý ferðsluóhapp hendu innan hálvan tíma, harímillum tveir bilar rendu frontalt saman**

FERÐSLUÓHAPP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Trý ferðsluóhapp innan hálvan tíma, hált sum á kalvabaki á vegnum, fýra til fimm ambulansir, umframt løgreglu og sløkkilið á staðið.

Tað tóktist næstan óveruligt í gjárkvøldið millum klokkan 22 og 23, tá tað brádliga gjørdist hált sum á kalvabaki við innkoyringina til Hósvíkar og umleið hálvan kilometur suður- og norðureftir frá innkoyringini.

Hálkan kom sera brádliga og hetta kom óvart á fólk, tí vegurin var táður aðrastaðni. Men við innkoyringina til Hósvíkar legðist brádliga ísur á vegin.

Fyrst misti ein førari, ið var á veg suðureftir, tamarhaldið á bilinum og fór við reyvini fyrst útav vegum niðan móti bygdini, umleið 60 metrar sunnanfyri innkoyringina.

Stutt eftir misti ein førari tamarhaldið á bilinum umleið 300 metrar norðanfyri innkoyringina til Hósvíkar, fór yvir í hina breytin og brast frontalt saman við ein annan bil, ið var á veg suðureftir. Meðan fólk tustu á staðið og onnur stóðu og forvitnaðust, kom brádliga enn ein bilur, ið var á veg suðureftir slongjandi eftir vegnum, inn móti bussskýlinum við Hósvík, og útav vegnum beint við bussskýlið. Hesin koyrdi hóast alt somikið spakuligt, at bara annað hjólið fór útav, og hann varð hjálptur uppaftur av fólki á staðnum.

## Professjonell tilbúgving

Fyrsti bilurin fór út av vegnum stutt eftir klokkan 22, og hini ferðsluóhappini hendu stutt eftir. Longu um klokkan 22.45 var fyrsti bilurin við útrykking á staðnum, og skjótt eftir fylgdu fleiri. Løgreglan kom á staðið, og tað sama gjørdu fýra ella fimm sjúkrabilar. Sera skjótt varð gjørt av, og má sigast at hetta var sera professjonelt av tilbúgvingarliðunum.

Hóast tað sá ógvusligt út, var talan ikki um nakran álvarsligan mansskaða. Í teimum báðum bilunum, ið rendu frontalt saman, breyt førarin í árenda bilinum øsbeinið, og eitt ferðafólk hevði brotið annan armliðin.

Umframt hesi bæði, vóru nøkur onnur ferðafólk í bilunum koyrd á Landssjúkrahúsið til eftirlit, sum vanlig mannagongd eisini er.

Førarin á tí bilinum, ið fór heilt útav vegnum sunnanfyri innkoyringina, segði seg hava rent høvdið í, men hevði tað gott hóast alt.

Løgreglan upplýsir at hann vildi sjálvur fáa bilin fluttan, og var talan tí ikki um nakran fólkaskaða har.

Samanumtikið spældi alt væl av, hóast tað ógvusligt sá út.

Landsverk vildi ikki salta í gjárkvøldið, men fólk frá Sunda Kommunu, ið kom á staðið, valdi sjálvboðið at salta landsvegin á hesum strekkinum, til tess at fyribyrgja eini størri vanlukku.

Vit hava roynt at fáa eina viðmerking frá Landsverk, um hví teir ikki saltaðu, men hetta er ikki eydnast áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Her síggjast støðini, har bilarnir fóru útav og rendu saman. Tveir bilar fóru útav sunnanfyri innkoyringina, og 250 metrar norðanfyri innkoyringina rendu tveir aðrir bilar frontalt saman*
*Mynd: www.kagi.fo*




